

*Í morgun varð farið undir at seta tær fyrstu íbúðirnar upp á Boðaneshamri. Á bryggjuni hivar ein krani hjá Júst Sivertsen sektiónirnar upp í trailarar hjá Iani Rasmussen, sum koyrir tær niðan á Boðaneshamar*

*Mynd: Jens Kr. Vang*



*J & K Petersen Íbúðir byggir tilsamans 32 íbúðir á Boðaneshamri. Tær fyrstu átta standa longu uppi í dag. Hetta er fyrsta íbúðarbygging av sínum slagi í Føroyum, og menn fylgja spentir við, hvussu væl alt kemur upp á pláss*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

Sandavági sær av.

- J & K Petersen hava gjørt alt jørðarbeiði, planerings-og betongarbeiðið, sigur verkætlanarleiðarin.

**Líkar íbúðir**

Tær 32 íbúðirnar hjá P/F J & K Petersen Íbúðir eru rættiliga líkar í stødd og útsjónd – og eisini í prísi.

- Íbúðirnar liggja millum 71,5 upp í 75,6 fermetrar, og prísirnir liggja millum 1,925 og 1,975 miljónir krónur hvør, sigur hann.

Eyðfinn Lenvig vísir á, at tað serliga eru fólk í fimmti ára aldri, sum hava ognað sær hesar íbúðirnar.

- Hetta eru fólk, sum kanska hava sitið í ov stórum húsum – ella, sum hava ilt við at fáa tak yvir høvdið í høvuðsstaðnum.

Hann leggur tó aftrat, at tað eisini eru yngri familjur, sum hava ognað sær íbúð á Boðaneshamri.

- Tað hevur gingið væl at selja íbúðirnar, og sum eg havi skilt, er nú bert nakrar heilt fáar eftir, sigur Eyðfinn Lenvig, verkætlanarleiðari hjá J & K Petersen Íbúðir.

# Trolbátar og garnaskip landa á Toftum

**Fýra skip hava landað á Toftum í dag, og meginparturin av veiðini, sum kom upp á land, var havtaska**

FISKIVINNA

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tíðliga í morgun landaðu garnaskipini Nim og Drelnes á Toftum. Skipini eru bæði heimahoyrandi í Suðuroy. Tey høvdu ávikavist 15.000 og 13.400 pund, meginparturin havtaska.

Á Fiskamarknaði Føroya siga tey, at ein partur av veiðini hjá skipunum fór fyri heili 40 krónur fyri kg.

Í dag hava eisini trolbátarnir Vesturfarið, sum er heimahoyrandi á Argjum og Tindur, sum er heimahoyrandi á Strondum, landað á Toftum.

Vesturfarið hevði 17.600 pund og Tindur 12.000 pund.

Ein stórur partur av veiðini hjá Vesturfarinum var havtaska, meðan veiðan hjá Tindi var eitt sindur meira blandað – við havtasku, toski og hýsu.

Á Landingarmiðstøð Føroya á Toftum vænta tey línuskipið Eysturoying í morgin. Teir fóru til fiskiskap 22. mars og hava eini 66.000 pund inni, harav eini 40.000 pund er hýsa.

Eysturoyingur hevur roynt undir Føroyum.

Á Landingarmiðstøð Føroya vænta tey kanska onkran bát aftrat fríggjadagin.

Í morgun, tá Sosialurin var fram við bryggjukantinum á Toftum, stóðu Heðin Davidsen og Andrias í Túni og tóku ímóti kassum, sum komu upp úr Vesturfarinum.

- Nei, hetta er ikki tann stóri dagurin í dag. Hetta eru smáir bátar, og tað er skjótt at fáa fiskin upp úr teimum, segði Andrias í Túni, tá ið vit heilsaðust á bryggjuni.



*Heðin Davidsen og Andrias í Túni taka ímóti fiskakassum, sum koma upp úr trolbátinum Vesturfarinum. Beint aftanfyri Vesturfarið liggur ein annar trolbátu Tindur og landar*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*